TEAM85




"Hví vit," spurdi Helena á veg av Ríkissjúkrahúsinum og hugdi niður í vegin fyri at krógva tárini.
Læknin hevði givið teimum greið boð: "Summar av heilakyknunum í Janu vóru gingnar til grundar og fóru ongantíð at koma aftur."

Jana var født ein summardag í 1966. Hon var fullborin, vigaði 7 pund, hevði ljóst hár og blá eygu. Men skjótt varnaðust foreldrini, at okkurt bilti henni. Tað bar ikki til at fáa eygnasamband við hana.
Helena og Hanus fingu boðini, at Jana var menningartarnað, tá ið hon var fýra ár. Læknin segði eisini, at tey kundu senda hana á Rødbygaard.

Tá á døgum, blivu øll føroysk børn, sum vóru so brekað, at foreldrini ikki maktaðu at hava tey heima, send til Danmarkar.

Har búðu tey á stovni saman við 800 øðrum; svóvu í stórum salum og gingu eins ílatin millum starvsfólk, sum ikki skiltu føroyskt.
Foreldrini vitjaðu tey sjáldan, tí tað var langt og dýrt at ferðast, og hjá nógvum slitnaði alt samband.

Hetta vildu Helena og Hanus ikki. Jana skuldi ikki á Rødbygaard. Saman við 70 øðrum foreldrum og avvarðandi stovnaðu tey felagið Javna. Helena gjørdist formaður, og felagið fór undir at skapa betri kor í Føroyum fyri menningartarnað - kor, sum kundu geva døttur teirra og øllum føroyingum, sum vóru goymdir burtur á Rødbygaard, eitt virðiligt lív.

Móttøka verður í Miðlahúsinum Týsdagin 31. okt. kl. 15.00

Bókin verður at fáa í bókasølunum frá Mikudegnum 1. nov.

ELRI

**Keypssamtøkan í Vágum**

FK Vágar sóknast eftir

## *Fólki til deildina í Sandavági*

at byrja 15. november ella eftir nærri avtalu

**Arbeiðstíð:**
Um 37 tímar um vikuna

**Vit rokna við, at tú**
- ert røkin
- ert blídlig/ur av lyndi
- ert álítandi
- ert fleksibul
- trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum

**Løn:**
Sambært S&K

Umsókn skal vera okkum í hendi innan 10. november 2006, ella skjótast til ber.
Send nøkur orð um teg sjálva/n til

FK Vágar
FO 370 Miðvági
att: Álvur Samuelsen
tel 332950 - 221130
as@fk.fo

fk

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

# BÚSKAPARFRØÐINGUR

HAGSTOVAN SÓKNAST EFTIR EINUM BÚSKAPARFRØÐINGI TIL AT STANDA FYRI HAGTØLUNUM UM GJALDSJAVNA OG UTTANLANDSSKULD.

### Ábyrgd

Uppgávan er at stíla fyri innsavningini og viðgerðini av upplýsingum til hagtøl um gjaldsjavna og uttanlandsskuld, at fremja uppgerðina sambært altjóða forskriftum og at kunngera úrslitini alment.
Tú situr ikki einsamallur ella einsamøll við uppgávuni, tí búskaparfrøðingarnir á Hagstovuni eru saman í toymi, sum arbeiðir tætt saman í felags arbeiðsætlan, har hvør einstakur kortini hevur sínar ábyrgdir.

### Førleikar

Vit sóknast tí eftir einum væl útbúnum búskaparfrøðingi, við áhuga fyri tjóðarbúskapi og hagtølum sum heild.
Góðir førleikar til hagtalsliga viðgerð av innheintaðum upplýsingum eru neyðugir og kunnleiki til vinnuligu viðurskiftini í landinum er ein fyrimunur.
Góð samstarvsevni og positivan hugburð til uppgávuna leggja vit stóran dent á.

### Starvið

Starvið er fulltrúastarv á Hagstovuni og verður samsýnt við løn sambært galdandi sáttmála millum Búskapar- og Løgfrøðingafelagið og Fíggjarmálaráðið.
Umsóknarfreistin er 1. novembur 2006, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Hermann Oskarsson ella John Jacobsen á telefon 35 28 00.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO